# Sandi av á hesum sinni





Símun V. Arge greiðir frá um fláirnar, har tey ymsu tíðarskeiðini síggjast, sum var talan um eina krossskipan ella stabbamynd við nýmótans hagtølum. Kanska hevur foksandur, sum er í onkrum av fláunum, verið ein orsøk til, at fólk eru flutt haðani.



onnur endamál enn bert at varðveita fornminni. Sum onkur tók til í skemti, so fáa sandingar helst brúk fyri meira kirkjugarðsplássi um nøkur ár, og tað hevði nokk ikki verið so heppið, um teir noyddust til Skopunar í hesum ørindum.

**Útlendsk fígging**

Fornfrøðiligu rannsóknirnar í summar hava verið meira umfatandi enn undanfarin ár. Umframt at kanningar eru gjørdar í sjálvum Junkarinsfløtti, er bakkin har sum nevnt eisini kannaður. Eisini bakkin á Sondum er kannaður. Áður hava rannsóknirnar tíðarfest fláirnar á hesum støðum til elstu miðøld, men av Fornminnissavninum verður sagt, at helst eru tær upp aftur eldri.

Símun V. Arge vísir á, at talan er um mest umfatandi vísindaliga útgrevsturin, sum er gjørdur í Føroyum. Vanliga er bert talan um neyðgrevstur her á landi, tvs. tá fornfrøðingar kanna eitt lendi, áðrenn ein vegur kann leggjast ígjøgnum tað ella tað kann brúkast til onnur endamál.

Tað er í høvuðsheitum oljufelagið Anadarko, sum hevur stuðlað verkætlanini. Tað er Oljufyristitingin, ið skal góðkenna slíkan stuðul frá oljufeløgum, og í hesum føri var serliga lagdur dentur á, at slíkur útgrevstur helst fer at koma føroysku ferðavinnuni til góðar. Partar av stuðlinum til rannsóknina eru eisini komnir frá amerikanska vísindagrunninum The National Science Foundation og City University of New York Northern Science & Education Center. Harafturat hevur Smyril Line stuðlað.

Tað eru serliga fólk av universitetunum í Bradford og Durham, ið hava luttikið í grevstrinum. Sum ein tók til, so var áhugavert at kanna landnám í Føroyum, tí talan var um sokallað "virgin landscape", tvs. at helst hevði eingin verið her áður enn tey, sum búsettust í Føroyum um ár 800. Í t.d. Írlandi hava fólk búð fleiri øldir fyri okkara tíðarrokning.

Nógv av teimum 15 fólkunum, ið tóku lut í útgrevstrinum, komu úr Hetlandi fyri ólavsøku, har tey í ein mánaða høvdu rannskað fornminni. Fleiri teirra eru



*Eini 150.000 djórabein eru funnin í útgrevstrinum á Sandi, sum verður mett at vera eitt sera virðismikið keldusavn. Tey verða øll send til New York til kanningar. Helst verða tey eisini nýtt í øðrum kanningum uttanlands og samanborin við kanningarúrslit í okkara grannalondum*

starvsfelagar, ið seinastu nógvu árini hava samstarvað í t.d. Íslandi og Grønlandi. Harafturat fingu føroysk lesandi høvi at vera við í arbeiðnum. Tey kunnu sostatt samanbera Føroyar við onnur lond rundan um okkum, og hevur hetta nógv at týða fyri granskingina. Eitt nú eru svínabeinini frá útgrevstrinum á Sandi longu farin til aðrar verkætlanir, har DNA skal kannast.

Á Sandi búðu tey øll saman á Ísansgarði, og lótu tey væl at. Umframt at hetta var hugnaligt, var hetta eisini praktiskt, tá úrslit skulu kannast og faklig sambond knýtast.

Tey verða helst aftur at síggja á Sandi næsta summar.